Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingskvinna

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum

Evni: Javnbjóðis møguleikar fyri familjur úr Suðuroynni í sambandi við barnsburð

Spurningar:

1. Ætlar landsstýriskvinnan at arbeiða fyri, at makar úr Suðuroynni kunnu fáa endurgjald fyri mista inntøku úr barsilskipanini, tá teir, vegna frástøðuna til meginøkið, havi inntøkumiss í fleiri vikur í sambandi við barnsburð hjá makanum?
2. Nær verða nýggju broytingarnar í barsilsskipanini settar í gildi?

Sum natúrligt er, so ynskja eisini barnakonur úr Suðuroynni at hava makan við, tá barnið kemur í verðina á Landssjúkrahúsinum í Havn. Tað ber sjáldan til at siga við vissu, akkurát nær barnið verður føtt, og tí er neyðugt at vera í Havn nakrar dagar áðrenn væntaða føðing - umframt dagarnar aftaná, at barnið er føtt.

Avleiðingin er, at tað eru nógvir makar, sum missa inntøku, tí teir fáa ikki møtt til arbeiðis teir dagarnar, sum familjan má vera í Havn. Hetta rakar serliga hart tímaløntar makar, men eisini fastløntar makar, sum mugu brúka sína uppspardu feriu uppá at bíða eftir barninum í Havn.

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum varðar av barsilsskipanini, har arbeitt verður við at gera barsilskipanina enn meira fleksibla.

Í hesum arbeiðinum kundi landsstýriskvinnan gjørt ein skipan fyri makar úr Suðuroynni, so suðuroyingar ikki eru fyri stórum vanbýti í mun til foreldur úr øðrum økjum í landinum og fáa javnbjóðis sømdir. Tí verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 16. januar 2026

Súsanna Bertholdsen